## Keldan fær vitjan

**Í Skálafirði:** Um vikuskiftið fær samkoman Keldan vitjan av Klaus Møller (myndin) úr Danmark. Hann fer undir vitjanini at tala á møtunum fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnudagin. Klaus Møller hevur ferðast til mong ymisk lond við gleðiboðskapinum og hevur eisini upplivað at nógv fólk eru vorðin grødd á møtum sínum. Hesa gávuna ynskir hann eisini at nýta, nú hann er gestur í Skálafirði.



## Skjeyt skarv á Borðoyavík

**Klaksvík:** Týsdagin fekk løgreglan í Klaksvík fráboðan um, at ein maður skjeyt skarv á Borðoyavík. Sambært Fuglaveiðulógini er henda veiðan bert loyvd í oktober og november mánaði, og tí er tað ólógligt í januar mánaði. Løgreglan kom á staðið, og maðurin fær nú bót fyri brot á lógina, umframt tað at hann missir veiðuna. Hann hevði skotið tríggjar skarvar.

## Nógvar sparingar við nýggjari hjábreyt

**Vágar:** Í næstseinastu viku kom fram uppskotið hjá Sørvágs kommunu um at gera nýggja hjábreyt til flogvøllin norð gjøgnum Klovan í nánd av verandi flogvølli í Vágum.

Hugskotið um eina flogbreyt gjøgnum Klovan tykist hava stóran áhuga, helst tí at nógvar sparingar eru við at brúka felags terminal og aðrar fasilitetir saman við verandi vølli.

Borgarstjórin í Sørvági, Jákup Suni Lauritsen hevur síðani uppskotið kom fram fyri almenningin, kunnað nevndina í P/F Vága Floghavn um uppskotið.

Nevndin er á einum máli um, at uppskotið er sera áhugavert og letur upp fyri fleiri spennandi møguleikum rakstrarliga, og tá talan er um logistik.

Sørvágs kommuna hevur givið P/F Vága Floghavn tilsøgn um eina positiva viðgerð av útbygging av flogvøllinum í Vágum.

Kommunan, er umframt at vera uppskotsstillari til nýggja flogvøllin í Klovanum, eisini byggimyndugleiki á økinum. Partarnir eru samdir um at hava tætt samskifti um málið.

**sb.**







*- Vit vóna og vænta, at eitt av fyrstu málunum, sum nýggja Løgtingið avgreiðir er at geva nevndini í P/F Vága Floghavn neyðuga myndugleikan at fara til verka, so útbyggingin av Vága Floghavn kann fremjast, sigur Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri í Sørvági*

# Klovin vælegnaður til flogvøll

**Økið í Klovanum er slætt og væl vallað. Tað gevur møguleika fyri einari langari breyt við lágum lendi báðu megin við, siga verkfrøðingar um uppskotið til nýggja hjábreyt í Vágum**

FLÚGVING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sørvágur:** Fyri at fáa vissu fyri, at uppskotið um nýggja flogvøllin er møguligt, hevur Sørvágs kommuna gjørt eitt stórt forarbeiði, nú uppskotið varð lagt fram.

Saman við P/F Munin og P/F Verkfrøðingarstovuni, hava tey sett seg í samband við Rambøl Danmark A/S, sum eru serfrøðingar í bygging og útbygging av flogvøllum í Danmark og øðrum londum.

- Sjálvandi er ikki møguligt innan fyri fáar dagar at fáa eina endaliga niðurstøðu um uppskotið.

- Men við at gera eina skjóta gjøgnumgongd av uppskotinum, sær Rambøl góðar møguleikar við uppskotinum, sigur Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri.

Hann vísir á, at økið gevur møguleika fyri einari langari breyt við lágum lendi báðu megin við.

Uppskotið frá Sørvágs kommunu byggir á eina breyt, sum er 1.800 metrar til longdar. Breiddin á vøllinum er eingin forðing.

Ynskist ein longri vøllur, er eingin orsøk at steðga her. Í Klovanum ber væl til at gera ein vøll, sum er 3.000 metrar langur, - farast kann enntá heilt út á 4.500 m langa breyt.

At gera koyriveg til flogfør millum flogvøllirnar er eingin trupulleiki. Bilferðslan koyrir so gjøgnum eina smogu í vegnum, sum er ætlaður til flogfør at koyra eftir.

Bogi Jacobsen, stjóri á P/F Munin upplýsir, at saman við Rambøl Danmark A/S hava teir gjøgnumgingið uppskotið.

Fyrstu kanningarnar eru lovandi og benda á góðar vónir um, at í Vágum fæst ein góð framtíðar heildarloysn, við tveimum breytum, har ymisku ættirnar í veðrinum hava ólíka ávirkan á breytirnar.

## Sagt um Klovan

**Fyri tveimum vikum síðani hevði sjónvarpið eitt innslag um innflúgvingina til nýggju hjábreytini har fleiri gestir vóru við. Hetta søgdu teir:**

*- Vit vilja gjarna vísa á eitt øki, sum vit halda kann brúkast sum flogbreyt. Henda loysning er góð, tí hon supplerar hin flogvøllin so væl.*
(Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri)

*- Í dag var hann útsynningur í ættini, og tað er í hesi ættini – og av suðri - at vit hava trupulleikar gjøgnum fjørðin við turbulensi, skýggjum og toku. Tað gav nærum ongan turbulens at koma inn í Klovan í dag*
(Kári Petersen, flogskipari)

*- Fyrstahonds inntrykkið var í øllum førum positivt.*
(Jákup W. Lauritsen, flogskipari)

*- Eitt áhugavert uppskot, sum má kannast nærri. Ein stórur fyrimunur er at menna umstøðurnar her á staðnum. Tað er eisini lættari og bíligari at gera tað herfrá, tí royndirnar eru her.*
(Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi)